UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 31. januar 2026
J. nr.: 26/01778

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-072/2025 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, um útlendska arbeiðsmegi og tilflytarar í Føroyum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir útlendingar hava arbeiðs- og/ella uppihaldsloyvi í Føroyum í dag?
2. Júst hvørjum londum kemur útlendska arbeiðsmegin úr, hvussu nógv koma úr hvørjum landi sær, og hvussu langt áramál hava tey verið her?
3. Hvussu stórt er talið á samfylgjandi familju, og hvørjum londum koma hesi úr?
4. Hvørjar eru treytirnar fyri at fáa samfylgjandi familju til Føroya?
5. Hvussu nógvir útlendingar eru komnir á føroyska arbeiðsmarknaðin, síðani Fast Track-skipanin varð sett í gildi, og hvørjum vinnugreinum arbeiða hesi í?

Svar til spurning 1

Útlendingastovan upplýsir fyri mær, at hon í 2025 lat tilsamans 1998 loyvir til uppihald í Føroyum, býtt millum 1301 upprunaloyvi, 666 framlongd uppihaldsloyvi og 31 varandi uppihaldsloyvi. Teir útlendingar, sum áður hava fingið varandi uppihaldsloyvi ella við tíðini hava søkt um og fingið danskan ríkisborgararætt, finnast ikki í aktuellu tølunum. Tøl hjá Landsfólkayvirlitinum, sum Útlendingastovan hevur móttikið, vísa, at pr. oktober 2025 búðu 2605 útlendingar í Føroyum.

Niðanfyristandandi talva vísur hagtøl fyri uppruna uppihaldsloyvir latin fyri árini 2016-2025. Upprunaloyvi eru uppihaldsloyvi givin fyrstu ferð til ein einstakling. Fyrivarni verður tikið fyri, at tølini eru tikin úr eini málsviðgerðarskipan og ikki eini hagtalsskipan. Tølini vísa uppihaldsloyvir latin árliga, og nøkur fyrivarni skulu takast, tí tølini vísa avgerðir um uppihaldsloyvir og ikki endiliga tilflyting ella búseting í Føroyum.

Á arbeiðsøkinum kann eitt upprunaloyvi tó vera givið einum og sama persóni meiri enn eina ferð yvir eitt tíðarskeið, til dømis tí starvsviðurskifti broytast, ella tí talan er um árstíðarbundið arbeiði. Viðmerkjast skal, at talan her er um eitt avmarkað tal. Ein gjøgnumgongd fyri 2025 vísur, at hetta tal var áleið 6% av teimum 526 Fast Track-loyvunum tað árið.

Talva – upprunaloyvir: 2016-2025

	Fast Track	ES-lógin	Vanliga útlendingalógin	Ítróttaravtalan	Familju sameining	Samfylgjandi familja	Samlað
2016	0	125	18	13	76	19	251
2017	0	240	55	17	62	31	405
2018	0	424	75	30	50	35	614
2019	0	653	161	32	73	53	972
2020	0	588	132	44	71	39	874
2021	60	620	176	45	64	48	1013
2022	635	839	21	62	59	118	1734
2023	372	699	144	51	66	125	1457
2024	421	547	70	45	63	68	1214
2025	526	476	123	52	48	37	1262

*Serlógin fyri persónar úr Ukraina er ikki við í hesi uppgerð, áleið 250 upprunaloyvir eru latin ukrainum eftir serlógini.

Svar til spurning 2

Útlendingastovan yvirtók avgerðarmyndugleikan viðvíkjandi arbeiðs- og uppihaldsloyvum tann 1. september 2024. Niðanfyri standandi talvur vísa tølini viðvíkjandi tjóðskapi fyri tíðarskeiðið 1. september 2024 til 23. januar 2026 í sambandi við latin upprunaloyvir eftir Fast Track skipanini, ES-lógini og vanligu útlendingalógini.

Fast Track, samlað, upprunaloyvir: 694

10 og yvir:

Filipsoyggjar	243
Indonesia	83
Kambodia	49
Nepal	38
Nigeria	23
India	24
Teiland	24

5 til 9:

Ethiopia	9
Fílabeinsstrondin	6
Meksiko	8
Serbia	8
Pakistan	6
Statsleys	5
Turkaland	5

Færri enn 5 loyvir:

Albania	Lettland
Algeria	Litava
Argentina	Makedonia
Avstralia	Madagaskar
Bangladesh	Marokko
Bosnia og Hersegovina	Niðurlond
Kamerun	Peru

Gana	22	Brasilia	7	Kanada	Portugal
Tunisia	18	USA	5	Kili	Romenia
Kenja	19			Kolombia	Russland
Ukraina	10			Egyptaland	Sri Lanka
Kirgistan	11			Gambia	Sveiss
Slovenia	11			Stórabretland	Tajikistan
				Honduras	Uganda
				Iran	Venesuela

ES-lógin, samlað, upprunaloyvir: 625

Yvir 20:		**10 til 20:**		**5 til 9:**		**Færri enn 5:**
Romenia	185	Kekkia	19	Ungarn	9	Niðurlond
Pólland	140	Bulgaria	17	Grikkaland	7	Belgia
Lettland	94	Estland	17	Spania	5	Írland
Slovakia	33	Týskland	12			
Litava	29	Frakland	11			
Portugal	26	Slovenia	10			

Vanliga útlendingalógin, samlað, upprunaloyvir: 129

5 og yvir:		**Færri enn 5:**	
Pólland	23	Egyptaland	Italia
Indonesia	12	Albania	Niðurlond
Stórabretland	8	Avstralia	Russland
Kanada	6	Kina	Spania
Grikkaland	6	Týskland	Sri Lanka
Ukraina	6		
USA	5		

Svar til spurning 3

Talva 1 vísir hagtøl fyri upprunaloyvir latin í árunum 2016-2025 til samfylgjandi familju. Talva 2 vísir hvørjir tjóðskapir talan var um í tíðarskeiðnum, har Útlendingastovan hevur havt avgerðarmyndugleikan, tvs. síðani 1. september 2024.

Tølini í talvu 1 fyri upprunaloyvir til samfylgjandi familju vísa, at síðani núverandi landsstýrið á heysti 2023 setti inntøkukrøv til útlendskar arbeiðstakarar, sum ynskja familju sína við sær til Føroyar, er talið á upprunaloyvum til samfylgjandi familju lækkað munandi frá 49/hjúnafeløgum/samlivum í 2023 til 18 og 16 hjúnafelagar/samlivar í ávikavist 2024 og 2025.

Í sama tíðarskeiði er talið av upprunaloyvum til samfylgjandi børn lækkað frá 76 børnum í 2023 til 51 og 31 børn í ávikavist 2024 og 2025.

Talva 1 – Samfylgjandi familja (arbeiði) – 2016 til 2025

	Hjúnafelagar o.a.	Børn
2016	6	13
2017	16	15
2018	15	20
2019	23	30
2020	20	19
2021	26	20
2022	40	78
2023	49	76
2024	18	51
2025	16	31
Samlað	**229**	**353**

Talva 2 – Tjóðskapir, samfylgjandi familja, upprunaloyvir (01.09.2024 – 23.01.2026)

Tjóðskapur	Upprunamál	Framleingjan	Tilsamans
Filipsoyggjar	16	10	26
Rumenia	0	6	6
Kina	3	0	3
Nepal	3	0	3
Pakistan	3	0	3
Onnur*	11	27	38
Samlað	**36**	**43**	**79**

*Undir hesum eru hesi londini umboðaði: Albania, Argentina, Bulgaria, Gana, Grikkaland, Kroatia, India, Írland, Kenja, Lettland, Pólland, Rumenia, Russland, Serbia, Teiland, Tunesia. Útlendingastovan yvirtók avgerðarmyndugleika 1. september 2024. Tølini viðvíkjandi tjóðskapi eru fyri tíðarskeiðið 1. september 2024 til 23. januar 2026.

Svar til spurning 4

Fyri at ein útlendingur við uppihaldsloyvi grundað á arbeiði í Føroyum kann fáa familju sína við hendan vegin, er tað m.a. ein treyt, at útlendingurin skal kunna uppihalda familju sínari fíggjarliga. Hin 2. september 2023 setti landsstýrið inntøkukrøv í málum um samfylgjandi familju, sum útlendingurin skal skjalprógva at lúka, fyri at familja hansara kann fáa uppihaldsloyvi í Føroyum eftir reglunum um samfylgjandi familju.

Um ein hjúnarfelagi ella samlivi søkir um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja, skal herbúgvandi útlendingur skjalprógva, at hann/hon hevur eina mánaðarliga lønarinntøku á 38.629,06 kr. (2026-støði).

Er talan um ein hjúnafelaga og eitt barn, sum bæði søkja um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja, skal herbúgvandi útlendingur skjalprógva, at hann/hon hevur eina mánaðarliga lønarinntøku á 44.343,88 kr. (2026-støði). Eru fleiri enn eitt barn, sum søkja um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja, hækkar áðurnevnda inntøkukravið við 1.480,42 kr. fyri hvørt barnið (upp til í mesta lagi 48.785,13 kr.).

Er talan einans um eitt barn, sum søkir um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja, skal herbúgvandi útlendingur skjalprógva, at hann/hon hevur eina mánaðarliga lønarinntøku á 31.710,81 kr. (2026-støði). Eru fleiri enn eitt barn, sum søkja um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familja, hækkar áðurnevnda inntøkukravið við 3.667,75 kr. fyri hvørt barnið (upp til í mesta lagi 42.714,06 kr.).

Svar til spurning 5
Í talvuni í svarinum til spurning 1 sæst, hvussu nógvir útlendingar hava fingið uppruna arbeiðsloyvi á føroyska arbeiðsmarknaðinum, síðani Fast Track-skipanin kom í gildi í 2021. Talvan vísur, at 60 persónar hava fingið upprunaloyvi eftir Fast Track-skipanini í 2021, 635 persónar í 2022, 372 persónar í 2023, 421 persónar í 2024 og 526 persónar í 2025.

Útlendingastovan hevur tíverri ikki tøl fyri, hvørjum vinnugreinum útlendingarnir arbeiða í, men upplýsir, at fiskavirkir og gistingarhús eru væl umboðað, tá tosað verður um Fast Track, eins og fiskiveiðuvinnan er væl umboðað.

Útlendingastovan gjørdi í 2022 og 2023 eina uppgerð yvir vinnugreinar og Fast Track. Fyrivarni skal takast fyri tølunum, men uppgerðin gevur tó eina greiða ábending um, hvørjir arbeiðsgevarar hava gagnnýtt skipanina.

Arbeiðs- og uppihaldsloyvi innan Fast Track, eftir vinnugeira (pr. nov. 2022):

1	Matvøruídnaðurin (fiskavirki o.a.)	260
2	Gistingarhús- og matstovuvinnan	169
3	Fiskivinna	85

Uttanríkis- og mentamálaráðið, tann 31. januar 2026

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna